# Ársfrágreiðing 2023

Hjartaliga vælkomin á aðalfund hjá Alzheimerfelagnum.
Vit skulu í stuttum líta aftur á tíðina síðan seinasta aðalfund, sum var 22. mars 2023.

Tað hevur verið nógv á skrá og nógvur aktivitetur í 2023.

Longu í januar ´23 heitti Alzheimerfelagið á landsstýriskvinnuna í heilsumálum um at fylgja Demensætlanini frá 2015 og raðfesta játtan til írestandi landsdemenssamskiparar (LD). Aftursvarið var, at landsstýriskvinnan fyrst vildi gera eina støðulýsing av ætlanini og demensøkinum.

Alzheimerfelagið læt sær tó ikki hetta lynda og var á fundi við fíggjarnevndina og strongdi á fyri at fáa politikararnar at raðfesta játtan, sum skuldi til fyri at fáa sett LD fyri alt landið.

Glað vóru vit, tá ið tað eydnaðist, og vit loksins kundu síggja fram til, at hetta tilmælið í Demensætlanini bleiv gjøgnumført.
Tá ið eitt fólk fær staðfest eina demenssjúku, skal samskiparin beinanvegin hava kontakt við viðkomandi og familjuna. Hann skal tryggja, at tey koma í kontakt við tær fyriskipanir, sum skulu stuðla og veita teimum tilboð og tænastur so sum kommunur/Almannaverk/kommunulæknar vm. LD er eisini bindiliðið millum borgara/demensklinikk og nærumhvørvi, hartil skal LD veita ráðgeving og vegleiðing til familjuna og aðrar samstarvspartar.

Sambært landsstýriskvinnuni eru tað nú settir landsdemenssamskiparar fyri alt landið. Tað hevur verið ein tungur burður, men tað hevur loyst seg at hanga í og halda út.

Øðrvísi stendur til við kommunalu demenssamskipanini. Eitt nú eru tað heilt fá øki, ið hava skipað seg við kommunalum demenssamskipara (KD), hetta hóast tað eru útbúnir yvir 120 demenssamskiparar í Føroyum seinastu árini. Flestu starvsfólk við demenssamskipara-útbúgving eru sett sum røktarstarvsfólk á t.d. demensdeildum ella dagtilboðum. Tað er sjálvandi eisini at fegnast um, men ynskiligt hevði verið, at fleiri demenssamskiparar vórðu settir sum KD og virkaðu sum samskiparar, serliga í mun til heimabúgvandi borgaran.

Tann kommunala demenssamskipanin er ikki neyvt lýst í "Demensætlanini fyri Føroyar 2015", og tað vísir seg at vera sera ymiskt, hvussu eldrasamstørvini umsita demensøki, og hvørjar tænastur og tilboð tey bjóða. Alzheimerfelagið hevur tí tikið stig til at lýsa og greina kommunalu demenssamskipanina.

Í ´23 søktu vit og fingu játtað stuðul úr verkætlanargrunninum hjá Megd til eina verkætlan at lýsa og greina kommunalu demenssamskipanina, herundir funktiónina hjá kommunalt settu demenssamskiparunum.
Við at greina og lýsa kommunala demenssamskipan, verður ein leistur mentur, ið er sjónligur og kann miðlast og gagnnýtast um allar Føroyar.

Ein eins leistur fyri kommunalari demenssamskipan kann gagna øllum á tann hátt, at tann einstaki persónurin við demensi fær somu hjálp/røkt og umsorgan, líkamikið hvar ið landinum ein býr, umframt at tað gerst møguligt fyri øll at kunna seg um og lesa seg til, hvat

kommunala demenssamskipanin er fyri nakað, og hvat ein kommunalur demenssamskipari er og ger.

Tað er Unn Justinussen, demenssamskipari og leiðari av demenstænastuni í Roðanum og næstforkvinna í Alzheimerfelagnum, sum stendur fyri verkætlanini.

Tað eru nógvar tænastur, ið skulu betrast. Ein tænasta, sum eigur at vera betrað til fólk við demenssjúku, er tannrøkt og tannlæknatænastan.
Tað er í mongum føri sera trupult ella ómøguligt hjá fólki, ið eru illa rakt av demenssjúku, at nýta verandi tannrøktarskipan.
Alzheimerfelagið sendi eitt skriv í heyst til Tannlæknafelagið og vísti á ótolandi støðuna hjá fólki við demenssjúku, sum ikki megna at leita sær tannrøkt og tannlæknahjálp í skipanini, sum vit hava í dag.
Í londunum runt um okkum hava tey nakað, tey kalla "Umsorganartannrøkt".
Alzheimerfelagið mælir til at seta slíka skipan í verk í Føroyum. Hetta er ein skipan, ið tryggjar øllum líka góða atgongd til tannrøkt og tannlækna, uttan mun til evni og førleika, og hvar í landinum ein býr.

**Arbeitt hevur eisini verið miðvíst við miðlan og upplýsing.**
Eitt kunningarkvøld var í Vágunum; har var góð uppmøting og stórur áhugi. Hetta var eitt samstarv við Vesturvón, sum hevði boðið Alzheimerfelagnum at greiða frá um arbeiðið, sum felagið ger og mál, sum arbeitt verður við, umframt upplýsandi kunning sum heild.
Unn Justinussen greiddi frá hvussu tann kommunala demenssamskipanin við kommunalt settum demenssamskiparum virkaði í Roðanum.
Alzheimerfelagið takkar Vesturvón fyri góða samstarvið.
Verkætlan "Minnisbonkur", sum varð avdúkað á Altjóða Alzheimerdegnum, hevur eisini sum endamál at varpa ljós á demenssjúkur og breiða vitan um demens út í alt samfelagið.
Demensur stavar frá heilasjúku og skal takast í líka stórum álvara sum allar aðrar sjúkur.
Á bonkinum er áskriftin *"Gloymsk, men ikki gloymd"*. Somuleiðis er QR-kota sett á bonkin, sum til ber at skanna við fartelefon. Slóðin vísur til heimasíðuna hjá Alzheimerfelagnum, har hent og upplýsandi tilfar finst um demens, útgreining, tænastur og tilboð
Tað er Tekniski Skúli í Klaksvík, sum sjálvboðin hevur staðið fyri sniðgeving og framleiðslu av minnisbonkinum, sum kommunurnar runt Føroyar síðan keypa og seta upp í kommununum.
Tekniski Skúli hevur havt sera nógv at gera og hevur eisini umvælt onkur høli, og hevur tað tískil tikið nakað av tíð at fáa sett gongd á arbeiðið at framleiða beinkirnar. Fyrsti bonkur verður tó vónandi heilt skjótt at síggja í onkrari kommunu. Vit eru sera fegin um góða samstarvið og viljan hjá tekniska Skúla í Klaksvík at samstarva um verkætlanina og takka eisini kommununum fyri stuðul og fyri áhugan at keypa benkurnar.

**2023 var eisini árið, har vit fingu nýggja heimasíðu.**
Í Demensætlanini 2015 verður mælt til at seta á stovn ein vitanardepil á Demensklinikkini, sum ma. skal hava eina heimasíðu við upplýsandi tilfari - eisini um føroysk viðurskifti innan demensøkið. Hetta tilmælið er tíverri ikki raðfest higartil. M.a. av hesari orsøk avgjørdi nevndin í Alzheimerfelagnum at raðfesta at gera eina nýggja og enn betri heimasíðu við meira føroyskum tilfari og t.d. upplýsingum um tilboð og tænastur her á landi.
Nógv orka varð løgd í arbeiðið, sum varð stuðlað fíggjarliga av limagrunninum hjá Megd. Eg haldi sjálv, at arbeiðið eydnaðist væl og vóni, at fólk eru glað fyri síðuna og uppliva, at tey fáa viðkomandi og nøktandi vitan og kunning á heimasíðuni.

**Tað hevur eisini verið skipað fyri ymsum tiltøkum í ´23**.
Av størri tiltøkum vil eg nevna tiltakið í Løkshøll og tiltøkini við AL Power og Jessicu Luh Kim.

Altjóða Alzheimerdagin 21 sep. varð skipað fyri einum tiltaki í Løkshøll í Runavík. Undirtøkan var sera stór, húsið var fullsett við uml. 300 luttakarum.

Heitið á tiltakinum var: "***Hvussu skapa vit eitt samfelag, har fólk við demens og teirra avvarðandi trívast?" M***.a. vóru fyrilestrar, sofaprát við avvarðandi og pallborðskjak.
Eg haldi ikki, eg taki munnin ov fullan, um eg sigi, at øll, sum luttóku í pallborðskjakinum, vóru á einum máli um, at neyðugt er at betra og samla demensøkið fyri at tryggja eins góð tilboð og tænastur til øll og ikki gera mun á fólki tongt at aldri, og hvar í landinum ein býr, soleiðis sum tað er í dag.
Alzheimerfelagið kann ikki góðtaka, at slíkur munur verður gjørdur á fólki, og at øll ikki fáa nøktandi og hóskandi tilboð og tænastur; vit streingja áhaldandi á at fáa avvarðandi myndugleikar og politisku skipanina at taka trupulleikan í álvara og endurskoða og skipa demensøkið betur.
Ljóð: Altjóða alzheimerdagur 2023 – Alzheimerfelagið

Mylnan valdi aftur í ár at stuðla Alzheimarfelagnum við at selja tvær vakrar og vælsmakkandi minniskøkur á Altjóða Alzheimerdegnum. Peningurin fyri køkurnar fer óskerdur til Alzheimerfelagið. Vit takka Mylnuni hjartaliga fyri trúfasta og týdningarmikla stuðulin. Tað hevur sera stóran týdning fyri bæði limir og Alzheimerfelagið at stuðla á hendan hátt, og soleiðis eisini vera við til at varpa ljós á Alzheimers og aðrar demenssjúkur.

**Í oktober vóru tvey tiltøk við fólki úr USA og Canada**
Skipað varð fyri tveimum tiltøkum við Al Power, sum er ein altjóða viðurkendur demensgranskari og lækni innan eldrasjúkur úr USA og starvsfelaga hansara, Jessicu Luh Kim, frá Canada.
Tey høvdu ein almennan fyrilestur í Reinsarínum 8 okt. við heitinum "**Hvørja ávirkan hevur okkara áskoðan og fatan av demensi á lívsdygdina og trivnaðin hjá fólki við demenssjúkum og teirra avvarðandi?**". Síðan høvdu tey tveir undirvísingardagar á Hotel Hafnia fyri 120 starvsfólkum frá kommunalu samstørvunum, Almannaverkinum og Demensklinikkini. ***"Eitt yvirskipað endamál hjá Al Power er at vísa á, hví ein ov trong, einstáttað áskoðan á demenssjúkur, eftir hansara tykki, kann vera skaðilig, og hvussu vit, við at broyta okkara áskoðan á demens og stuðla undir trivnað og lívsdygd, kunnu betra um gerandisdagin og lívið hjá fólki við demensi og teirra avvarðandi".***

Tiltakið var í størstan mun fíggjað við pengum frá Eden-bólkinum. Al Power er nógv inspireraður av Eden og grundar eisini nógv av undirvísingini í júst Eden-hugsjónini. Afturmeldingarnar vóru sera jaligar. Til fyrra dagin vóru Margret og Sofus Joensen boðin við sum heiðursgestir. Teimum varð takkað fyri teirra stóra og ótroyttiliga arbeiði innan demensøkið í Føroyum, tvær eldsálir og fyrimyndir.
Fyrilestur við Al Power og Jessica Luh Kim (youtube.com)

**Samstarvsfundur við Demensklinikkina.**
Á samstarvsfundi við Demensklinikkina á Landssjúkrahúsinum varð greitt frá arbeiðinum " Demensvinarligari 2025", sum eitt verkætlanarfólk hevur arbeitt við seinnu árini.
Verkætlanin lýsir m.a. sokallaðar "Tilboðspakkar". Royndir aðrastaðni frá og eftirspurningur

í okkara egna landi vísa, at tað er skilagott at býta tilboðini til fólk við demenssjúku og teirra avvarðandi upp í tríggjar bólkar/pakkar.

1. Tilboð beint sum sjúkan er staðfest
2. Tilboð mitt í sjúkugongdini
3. Tilboð tá ið ein er komin longur í sjúkugongdini

Demensklinikkin mælir til, at tann kommunali demenssamskiparin og demenssamskipari hjá Almannaverkinum (sum tó enn ikki hevur demenssamskipara) meta um og fyriskipa hóskandi tilboð og tænastur við støði í "tilboðspakkunum".
Hóast Demensklinikkin fyri einum 3 árum síðan hevur greinað og lýst, hvussu pakkatilboðini eiga at formast og virkjast, er tíverri framvegis langt á mál við at seta tað í verk hjá flestu eldrasamstørvum og Almannaverkinum.
Alzheimerfelagið vónar, at verkætlanin at lýsa og greina kommunalu demenssamskipanina kann skumpa undir "tilboðspakkarnar" í kommununum.

**Í september høvdu vit ein uppfylgjandi fund við Demensdepilin á Tjarnargarði í TK.**
Alzheimerfelagið var á fundi við leiðsluna á Demensdeplinum, sum læt upp í mai 2021. Endamálið var at hoyra, hvussu nýggja konseptið við tí góðu tilgongdini fyri fólk við demenssjúku og teirra avvarðandi hevur hilnast.
Greitt varð frá, at tað hevur tikið tíð at byggja depilin og allar funktiónirnar upp. Eisini hava verið avbjóðingar við at fáa nokk av starvsfólki, serliga faklærdum starvsfólkum.
Hartil hava tey bíðað eftir at virkja ta kommunalu demenssamskipanina við kommunalum demenssamskiparum (KD), til tað vóru settir landsdemenssamskiparar (LD) til Havnina. Tá so LD vóru settir á heysti 2023, setti Tórshavnar Kommuna beinanvegin gongd á arbeiðið við KD. Tað, ið svarar til eitt fulltíðarstarv, er sett av til KD, og hevur tað víst seg at rigga væl, upplýstu tey. Við ársenda 2023 vóru longu fleiri heimabúgvandi borgarar knýttir at kommunalu demenssamskipanini í Tórshavnar kommunu. Hetta fegnast Alzheimerfekagið um.

**Fundur við Hjálpartólamiðstøðina.**
Samstarvsfundur var á heysti við Hjálpartólamiðstøðina í Almannaverkinum. Tað vísir seg at vera lítið av tólum og hjálparamboðum, ein kann lána frá Hjálpartólamiðstøðini, tá ið talan er um fólk við demenssjúku.
Fólk, sum gerast sjúk av Alzheimers ella aðrari demenssjúku, hava oftast tørv á øðrum hjálpartólum enn teimum "vanligu" hjálpartólunum, vit kenna frá fólki við niðursettari rørslu, so sum rollatori, koyristólum, sokkaílatara o.ø.
Alzheimerfelagið hetti á Hjálpartólamiðstøðina um at raðfesta hjálpartól til demensrakt hægri, so sum ávaringarskipanir, komfýrvarnarar og demensvinarligar ruggistólar v.m.
Sambært tilmælinum í Demensætlanini verður mælt til at útnevna terapeutar í Almannaverkinum, sum savna vitan og royndir um hjálpartól.
Alzheimerfelagið heitti á hjálpartólamiðstøðina um at arbeiða fyri hesum.

**Avvarðandibólkur**
Afturvendandi árliga tilboðið við avvarðandibólkum hevur víst seg at vera væl umtøkt. Soleiðis var eisini í fjørð, og eru vit longu í gongd aftur í ár við avvarðandibólkum.

**Sjónleikur.**
Í juli framførdi Det Ferösche Compagnie sjónleikin Lear Kongur. Birita Mohr, sum sjálv hevur alzheimersjúku, hevði høvuðsleiklutin.

> *"Vit hava skapað eitt rúm, har Birita kann blomstra og vera í sínum elementi sum menniskja og ikki sum alzheimersjúklingur. Og mín vón er, at áskoðararnir fara út við tí kensluni, at vit í nógv størru mun kunnu aktivera, skapa rúm fyri og eisini læra av fólkum, sum eru øðrvísi, sum mamma mín".*
>
> Búi Dam, leikstjóri.

Hetta er ein boðskapur, sum Alzheimerfelagið tekur undir við, og stuðlaði Alzheimerfelagið eisini framleiðsluni av sjónleikinum við 50.000kr.

Vegna nevndina í Alzheimerfelagnum takki eg øllum, sum stuðla felagnum, serliga okkara limum, tí uttan tykkum var einki felag.

Takk fyri!